Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Tordur Niclasen, løgtingsmaður

Svarari: Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Markamótaskjalið og tænastan til teirra, ið eru yngri enn 67 ár

Spurningar:

1. Hvussu langt er komið við at fremja ásetingarnar í Markamótaskjalinum – til gagns fyri borgarar yngri enn 67 ár ?
2. Er ætlanin at fáa kommunurnar at hava ábyrgdina av tænastuni til teirra, ið eru millum 18 og 67 ár ?

Viðmerkingar:
Tá eldraøkið í 2015 varð lagt út, fingu kommunurnar ábyrgd av teim, ið eru 67+; Almannaverkið ábyrgdina av tænastuni til teirra millum 18 og 66 ár.
Nógvar kommunur hava lagt stóra orku í at veita tænastur í mun til tørvin.
Verri stendur til við teim tænastum, ið Almannamálaráðið hevur ábyrgd av.
Tað kom greitt fram undir pallborðsorðaskiftinum, sum Alzheimerfelagið á sinni skipaði fyri undir heitinum **"**Demensvinarligt samfelag".
T.d. er dømi um persónar, sum eru "strandaðir" á sjúkrahúsum í fleiri mánaðir, tí eingin tyktist at kunna og/ella vilja veita teim nøktandi tænastu, eftir at sjúkrahúsviðgerðin var lokin.
Orsøkin til hesa óvirðiligu støðu, sum persónar eru komnir í, er, at viðkomandi ikki hevur nátt pensjónsaldur, og sostatt fellur uttan fyri reglurnar um upptøku til búpláss á ellis-og røktarheimum og eldrasambýlum hjá kommununum.
Vísandi til Markamótaskjalið, undirskrivað av avvarðandi pørtum 30.05.16, verður fylgjandi staðfest í "Markamót 3" : "*3. Markamót er somuleiðis, tá talan er um borgarar, sum ikki eru fólkapensjónistar, men hevur varandi sjúku ella serligan tørv á røkt alt samdøgrið"*.
Tá slík støða tekur seg upp, verður fylgjandi sagt í sama "Markamót 3*": "Landið hevur ábyrgdina av at veita persónum við týðandi likamligium ella sálarligum breki ella víðfevnandi sosialum trupuleikum, og sum tørva hjálp og stuðul til vanligt dagligt virksemi, umframt møguliga røkt, búpláss"*.
Vísandi til løgtingslóg nr. 19 frá 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m. verður í § 14, stk. 2 sagt: *"Í serligum føri kann røktarheim ella eldrasambýli eisini hýsa øðrum røktarkrevjandi persóni enn fólkapensjónisti"*.
Sostatt er teoretiskur møguleiki til staðar, at persónar yngri enn 67 ár kunnu fáa pláss á røktarheimi ella sambýli hjá kommununum. Verunleikin er bert, at í slíkum førum verður kravd "gjaldváttan" frá Almannverkinum, áðrenn støða verður tikin til møguliga upptøku á røktarheimi og sambýli.
Verður slík játtan ikki givin, ja, so er eingin hjálp at heinta frá teim kommunalu stovnunum.

Um kommunurnar eisini høvdu ábyrgd av teim yngri enn 67 ár, so vildi støðan uttan iva verið munandi betri.
Sostatt er tað umráðandi og alneyðugt, sum skjótast at fáa hesar forðingar, ið raka tey yngri enn 67 ár, av vegnum.
Í samgonguskjalinum, sum varð undirskrivað fyri tveimum árum síðan, stendur: ”*Við atliti til borgarar millum 18-66 ár verða ásetingarnar í Markamótaskjalinum settar í verk*”.
Tað er í hesum sambandi, at fyrispurningurin verður settur.

Á Løgtingi, 12. november 2021

Tordur Niclasen